e-mail: jakup@sosialurin.fo

# ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið alt um ítróttin um vikuskiftið í týsdagsblaðnum ella á alnetinum: www.sosialurin.fo**

# Stjørnugullið nærkast í hvørjum

*Hondbóltur um vikuskiftið: VB skal leika tveir dystir norðanfyri, harav annar er móti gullgentunum úr Klaksvík, sum leygardagin kunnu taka næst seinasta fetið mótvegis gullinum. Hjá monnunum verður talan um tríggjar dystir, har toppur og botnur hittast*

JÁKUP MØRK

Seks hondbóltsdystir verða leiktir leygardagin, men ikki er líkt til, at nakar teirra fer at avgera, hvagar gullmerkini enda í fremstu hondbóltsdeildunum.

**Tvær ferðir VB**
VB skal hetta vikuskiftið gera tveir dystir burtur av sær. Leygardagin skulu tær til Klaksvíkar, har lokalu stjørnurnar, sum higartil hava vunnið allar dystirnar í endaspælinum eru vertir.

Um VB ætlar sær nøkur stig við sær aftur, tá tær sunnukvøldið seta kós móti heimbygdini, so man tað ikki vera í Klaksvík at hesi skulu finnast. Verður sæð burtur frá heilkiksaranum móti VÍF í grundspælinum, hava klaksvíksgenturnar nevnliga vunnið allar landskappingardystirnar, og eru tær tískil klárt á odda í landskappingini. Gaman í snávaðu tær í steypakappingini, men FM heitið er teirra, eingin ivi um tað.

So munnu vónirnar hjá VB helst verða betri, tá tær sunnudagin skulu leika móti Neistanum. Spurningurin man tó helst vera, hvussu motiveraðar suðuroyargenturnar eru, tí teirra lutur í landskappingini er langt síðani útspældur. Neistin hevur hinvegin enn heiðursmerki at stríðast fyri, og helst munnu tær á heimaliðnum hava ætlanir um at geva Christiani Poulsen fyrstu stigini sum venjari.

Um Stjørnan, sum væntað, vinnur á VB leygardagin, er tað bert VÍF, sum hevur nakran sum helst møguleika at røkka teimum. Í hvussu so er fram til 12. mars. Gullmerkini munnu vestmannagenturnar tó hava gloymt alt um, men hinvegin er neyðugt við einum sigri sunnudagin, um tær skulu halda fast í silvurdystinum.

Tað má eisini metast rættuliga sannlíkt, at VÍF megnar at basa Tjaldrinum, sum enn ikki hevur fingið stig hetta kappingarárið. Seinasti dysturin endaði við ikki minni enn 32-9, og sigur hetta eitt sindur um styrkismunin millum liðini bæði. Ikki kann væntast, at sigurin verður eins stórur hesu ferð, men hinvegin kann væl verða, at málmunurin verður avgerandi fyri, hvønn veg silvurmerkini fara, og tí fara vestmannagenturnar helst at dyrgja eftir einum sannførandi sigri.

**Toppur móti botni**
Hjá monnunum verður talan um tríggjar uppgerðir, sum allar hava til felags, at talan er um topplið, sum leika móti onkrum av botnliðunum.

Í Havn verður dystur millum H71 og Kyndil, og lítil ivi man verða um, at Kyndil fer avstað við stigunum í hesum dysti. Einasta fellan, sum kyndilsmenn kunnu detta í, er um teir mikukvøldið sóu hoyvíkingar, og tískil rokna við, at spælið verður eins vánaligt sunnudagin. Neyvan verða hoyvíkingar somikið vánaligir, sum teir vóru mikukvøldið, men hinvegin skal rættuliga nógv til, um teir ætla sær at gera nakað sum helst við kyndilsliðið.

Í Runavík tekur Tjaldur móti Vestmenningum, men hóast runavíkingar mundu koppað favorittunum í øvugta dystinum, so skulu teir ikki rokna við eini endurtøku hesu ferð. Munurin á liðunum báðum er snøgt sagt alt ov stórur, og kann hetta eisini lesast á stigatalvuni, har tað sæst, at VÍF er á fremsta og Tjaldur á niðasta plássinum,

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið verður í Vestmanna, har KÍF tekur ímóti føroyameistarunum av Strondum. StÍF er framvegis millum biðlarnar til FM-heitið, og kunnu tískil ikki loyva sær at gera nakað býtt í hesum dysti. Kolfirðingar hava annars fingið góða úrtøku í seinastu dystunum, men hetta hevur verið móti runavíkinum og hoyvíkingum, so talan er um heilt aðra mótstøðu hesu ferð.

Lítið er tí, sum bendir á, at støðan á stigatalvuni hjá monnum fer at broytast nakað sum helst eftir vikuskiftið, men hinvegin hava vit alt árið bíðað eftir eini sensatión, og so leingi, sum dystirnir ikki eru leiktir, eru úrslitini heldur ikki greið.

### Støðan undan vikuskiftinum

Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 459 | 356 | 103 | 21 |
| 2 Kyndil | 6 | 3 - 0 - 3 | 382 | 342 | 40 | 13 |
| 3 VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 380 | 339 | 41 | 13 |
| 4 Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 320 | 321 | -1 | 11 |
| 5 VB | 5 | 1 - 0 - 4 | 375 | 392 | -17 | 6 |
| 6 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 268 | 434 | -166 | 0 |

Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 548 | 433 | 115 | 21 |
| 2 Neistin | 6 | 6 - 0 - 0 | 529 | 450 | 79 | 21 |
| 3 StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 521 | 451 | 70 | 19 |
| 4 Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 508 | 441 | 67 | 15 |
| 5 KÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 432 | 539 | -107 | 7 |
| 6 H71 | 7 | 1 - 0 - 6 | 445 | 537 | -92 | 4 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 459 | 591 | -132 | 3 |

# Toppur móti botni

*Flogbóltur: Meistararnir úr Mjølnir fáa um vikuskiftið vitjan av fuglfjarðakvinnum, meðan Fleyrkvinnur skulu vestur í Vágar at hevna tapið í semifinaludystinum týskvøldið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mest spennandi dysturin í flogbólti hetta vikuskiftið verður eftir øllum at døma dysturin á Giljanesi sunnudagin. Tá hittast Dráttur og Fleyr og tann dysturin er ein endurtøka av semifinaluni, sum varð leikt týskvøldið.

**Hevnd fyri semifinaluna**
Tann dystin vann Dráttur eftir tógvið stríð, og tí er lítið at ivast í, at Fleyrkvinnurnar vilja gera alt fyri at vinna dystin á Giljanesi sunnudagin. Tað kom teimum illa við, at tær mistu steypafinaluna á gólvið, serliga tá havt verður í huga, hvussu illa hevur gingist í hond hjá teimum í ár.

Í veruleikanum er dysturin sunnudagin seinasti møguleiki hjá Fleyrkvinnum at vinna seg inn á Drátt, sum er liðið, sum liggur beint omanfyri tær í stigatalvuni. Tapa tær dystin, verða tær at taka til takkar við fjórðaplássið og í ringasta føri, fimtapláss.

Tað plássið hevur ÍF í løtuni, men tær eru ikki so langt aftan fyri Fleyr. Her skulu vit tó siga, at havnarkvinnur hava tann fyrimunin, at tær hava leikt ein dyst færri og tí hava ein møguleika eyka at enda frammanfyri ÍF.

ÍF skal annars til klaksvíkar at vitja meistararnar sunnudagin. Mjølnir vann meistaraheitið seinasta vikuskiftið, og hóast tær hava lagt upp til at nýggir leikarar skulu fáa pláss og leiktíð, so er lítil ivi um hvør fer at vinna tann dystin.

**Fram skal reisa seg**
Hjá monnum eru eisini tveir dystir á skránni. Mjølnirmenninir fáa eins og kvinnurnar vitjan úr Fuglafirði. Støðan hjá mansliðnum hjá ÍF er ógvuliga lík teirri hjá kvinnuliðnum hóast teir vóru meistarar til seinasta vikuskiftið tá Fleyr tók tann heiðurin frá teimum.

Fuglfirðingar liggja og róta í botninum av stigatalvuni og hava havt ilt við at fóta sær í ár. Kortini hava teir gjørt onkran hissini vørr og millum annað vunnu teir á Mjølnir á Kambsdali í fyrru helvt. Men síðani hevur gingið meira striltið at vinna nakrar dystir.

Mjølnir harafturímóti er væl fyri í løtuni og tað tykist, sum hava teir fóta sær nú kappingin nærkast endanum.

Fyri stuttum vunnu teir sær rætt at spæla steypafinalu móti Fleyr og sum dystirnir teirra millum hava háttað sær higartil í ár, er ikki óhugsandi at Mjølnir kann vinna tann dystin.

Teir hava í hvussu er vunnið fleiri dystir á Fram í seinastuni og eru í løtuni besta boðið upp á ein silvurvinnara í løtuni.

Hitt boðið, sum er Fram, skal til Sørvágs at spæla. Sørvingar hava fullkomiliga mist fótafestið í seinnu helvt eftir eina framúrskarandi góða byrjan. Stígur er komin í av ymsum ávum og torført er at spáa um teir megna at gera nakað við Fram, sum liggur og togast við Mjølnir um silvuri.

### Støðan undan vikuskiftinum

Støðan, meistaradeild kvinnur

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 13 | 12 - 1 | 25 | 2 | 23 | 17 |
| 2 TB | 13 | 7 - 6 | 16 | 16 | 0 | 10 |
| 3 Dráttur | 13 | 6 - 7 | 15 | 17 | -2 | 8 |
| 4 Fleyr | 12 | 4 - 8 | 9 | 18 | -9 | 5 |
| 5 ÍF | 13 | 4 - 8 | 10 | 22 | -12 | 3 |

Støðan, meistaradeild kvinnur

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 13 | 13 - 0 | 23 | 3 | 23 | 18 |
| 2 Mjølnir | 13 | 7 - 6 | 17 | 14 | 3 | 10 |
| 3 Fram | 13 | 7 - 6 | 15 | 15 | 0 | 10 |
| 4 SÍ | 13 | 3 - 10 | 11 | 22 | -11 | 3 |
| 5 ÍF | 12 | 2 - 10 | 6 | 21 | -15 | 3 |



# Vandu vikuskiftið á tamb

*Seinasta vikuskifti var nakað heilt serligt hjá 24 ungum smádreingjum í Havn. Teir vóru nevnliga allir við á eini venjingarlegu, sum Havnar Bóltfelag skipaði fyri, og fingu á tann hátt roynt eitt sindur av tí, sum yrkisleikarar merkja á egnum kroppi so at siga hvønn dag*

ORÐ: JÁKUP MØRK
MYNDIR: JENS K. VANG

Seinasta vikuskifti finugu 24 ungir dreingir eina av størstu fótbóltsupplivingum sínum higartil.

Hetta var, tá Havnar Bóltfelag hevði fyriskipað eina venjingarlegu, har dreingirnar so at siga sluppu at royna, hvussu stuttligt, og ikki minst hvussu hart, fót-



bóltslívið kann verða.

**Strævin skrá**
Teir 24 dreingirnir eru allir við á piltaliðnum hjá HB, og venjarar vóru teir báðir, Áki Davidsen og Egil Jacobsen.

Undan vikuskiftinum høvdu allir dreingirnir fingið tillutað eina skrá, har tað greitt framgekk, hvat skuldi gerast um vikuskifti, og møguliga var eisini onkur teirra, ið stúrdi, tá teir só skránna.

Venjing, venjing og venjing, onkur smávegis dystur, og annars matur, prát og hvíld. Ikki tí, dreingirnir orka ivaleyst at beistast og renna í væl longri tíð, enn vit vaksnu gera, men kortini kunnu 12 tímar av fótbólti innan 31 tímar tykjast í heldur meira lagi.

Teir báðir venjararnir siga við Sosialin, at endamálið við leguni als ikki er, at dreingirnir skulu verða so væl fyri sum gjørligt, nú kappingarárið skjótt fer av barkastokki. Heldur er talan um at geva dreingjunum eina uppliving fyri lívið, sum samstundis er ein liður í teirra ítróttarligu og fótbóltsligu menning. Eini menning, sum felagið seinni kann fáa gleði av.

**Góðar framtíðar møguleikar**
Langsiktaða endamálið er sjálvandi, at felagið skal royna at uppala nakrar framtíðar fyrstaliðsleikarar, og venjararnir mettu sjálvir, ta hetta var ein háttur at gera arbeiðið upp á.

- Vit hava jú fleiri framúr góðar og evnaríkar ungar leikarar í landinum, og við einum miðvísum arbeiði eiga vit at kunna hækka støðið á føroyskum fótbólti enn meira, greiða venjararnir frá. Víðari siga teir, at hetta er so ein bara ein møguleiki, tí sjálvsagt eru fleiri aðrir hættir, sum kunnu nýtast og verða nýttir kring landið.

Framtíðin hjá føroyskum fótbólti kann tí tykjast at verða bjørt, og uttan iva hava fleiri av leikarunum, sum vóru til venjingar ein dreym um, at teir eina ferð í framtíðini kunnu liva av spælinum við rundu leðurkúluni.

**Nógvir leikarar**
Tað ljóðar kanska av nógvum, at tveir venjarar skulu halda skil á 24 smádreingjum eitt heilt vikuskifti, men teir báðir siga við ein munn, at hetta als ikki eru allir dreingirnir í aldursbólkinum.

Við tað, at piltadeildin telur somikið nógvar leikarar, gjørdu vit av, at tað bert vóru teir dreingir, sum eru føddir í 1978, sum komu við, og bara hesin eini árgangurin telur umleið 40 leikarar, so uttan iva kundi talið verið hægri.

Tískil varð neyðugt at taka nakrar burtur úr, og hetta harmast venjararnir báðir um. - Hetta hevur jú við sær, at fleiri leikarar ikki sleppa upp í part, hóast hetta einki hevur við fótbóltsevni teirra at gera. Onkustaðni máttu vit tó skera ígjøgnum, men vónandi ber til at hava eitt størri luttakaratal, um høvi býðst eina ferð afturat.

**Góð foreldur**
Sjálvsagt er eitt veldugt fyrireikingararbeiðið, sum skal fáast frá hondini, tá ein slík venjingarlega skal gerast.

Her hava venjararnir tó fingið stóra hjálp frá foreldrabólkinum, við tað at foreldrini at dreingjunum stóu fyri so at siga øllum tí praktiska aftan fyri leguna. Venjararnir høvdu tískil ikki fyri neyðini at hugsa um, hvussu maturin skuldi tilgerast, um klæðini vórðu vaskaði o.s.fr.

Einasti luturin, sum teir skuldu hugsa um, var ítróttarligi parturin, og sambært teimum báðum hevði tað so at siga verið ógjørligt at fyriskipað venjingarleguna uttan stóru hjálpina frá foreldrunum.

At teir á henda hátt fingu møguleika til bara at hugsa um ítróttarliga partin, halda teir báðir eisini var ein stórur fyrimunur, sum gjarna skuldi givið úrslit í eini betri tilrættislegging av sjálvari venjingini.

Í øllum førum sóu allir dreingirnir út til at hugna sær ófórt, har teir við hvør sínum bólti royndu at venja og fínpussa nakrar av teimum lutum, sum eru neyðugir at hava við sær á fótbóltsvøllin.





*Teir báðir, Dánjal og Tróndur, ætla framhaldandi at seta kósina upp eftir í teirra leið móti fótbóltstindunum*

# Ein stór uppliving

*Hjá dreingjunum sjálvur var eingin ivi*

Tveir av teimum 24 dreingjunum, sum um vikuskiftið vóru á venjingarleguni, eru Tróndur Sigurðsson og Dánjald Davidsen.

Teir báðir siga við ein munn, at fyri teirra viðkomandi var venjingarlegan bæði stuttlig og hugnalig.

**Borgarstjórin vitjaði**
Hóast nógv venjing var á skránni, so vóru eisini stundir til annað, og leygardagin fingu dreingirnir so vitjan av Leivi Hansen, borgarstjóra.

Leivur hevði greitt frá, hvussu tað var at spæla fótbólt, tá hann var smádrongur, og hvussu stórur munur var á umstøðunum tá og nú.

**Hava dreymir**
Tróndur og Dánjal hava sjálvandi, eins og flestu javnaldrarnir á fótbóltsvøllinum, ein dreym um, at teir eina ferð í framtíðini kunnu hava gerast yrkisleikarar uttanlanda, og tá tosið fellur á, hvat lið teimum dámar best, eru teir púra samdir. Manchester United stendur ovast á listanum, men eisini dámar teimum væl spanska stórfelagið, Barcelona.

Nú lagaði alt seg eisini soleiðis, at meðan venjingarlegan varð hildin, leikti Manchester United oddadyst í Leeds. Ein dystur, sum varð sýndur á ensku rásini, Sky Sport.

Hetta høvdu dreingirnir møguleika at síggja, men orsakað av nógvu venjingini, eydnaðist tað teimum bert at síggja seinastu 20 minuttirnar av dystinum.

**Hava ferðast**
Hetta er tó ikki einasta ferðin, at teir báðir hava verið saman í fótbóltsørindum.

Í fjørð vóru teir við HB á Danmarkarferð, har teir luttóku í Solsidsens Pondus Cup, sum á hvørjum ári verður hildi ní Nørresundby.

Harumframt hava teir eisini verið við í allar flestu av teimum innandura kappingum, sum veturin á tamb verða fyriskipaðar kring landið.

Onkra av hesum hava teir eisini vunnið, so ivalyest hava teir okkurt at hava fótbóltsdreymarnar í, hesi báðir piltarnir, sum vit kanska fara at hoyra meira til um nøkur ár.

Stendur tað til teirra, er í øllum førum eingin ivi um hetta seinasta.